## Týskur HM-sigur á súkklu

Heldur óvæntað vann týski Bert Grabsch HM-heitið í einkultstarti, tá hetta varð á skránni í gjár. Ikki minst varð Levi Leipheimer roknaður sum favorittur, men hann rakti ikki dagin, og so koyrdi Grabsch sigurin heim. Og sera óvæntað fór silvurið til canadiska Svein Tuft, sum tó súkklaði 42 sekund seinni enn Grabsch.



## Armstrong saman við Contador

Sjeyfaldi Tour de France vinnarin, Lance Armstrong, hevur nú váttað, at tað verður við Astana-liðnum, at hann fer at súkkla aftur. Við hesum er greitt, at Armstrong verður á lið saman við Alberto Contador, sum í ár hevur vunnið bæði Firo d'Italia og Vuelta a Espana, og sum er stórfavorittur at vinna Tour de France eisini.

ÍF-Skála:

# Skála hevur knívin á barkanum

*Fuglfirðingar skulu helst hava okkurt stigið afturat, um teir skulu kenna seg tryggar. Hjá Skála stendur hinvegin um lív í hvørjum dysti*



**Fuglfirðingar rokna við stórari mótstøðu, og um tað verður, sum tað áður hevur verið, tá ið Skála hevur verið í stórum vanda fyri at flyta niður, so fara skálamenn at leggja nógv fyri**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í morgin fer Formula liðið hjá Skála saman við trúføstu stuðlunum um Gøtueið og Varmakeldueið og til Fuglafirðar. Tað er møguleiki fyri, at Skála seint seinnapartin fer at fara til hús við staðfestingini í viðførinum um, at besta Skála liðið næsta ár ikki verður partur av bestu deildini.

Skála hevur á 10. plássi 18 stig, og KÍ er á 8. plássi við 24 stigum. Um KÍ fær fult á Toftum, og Skála einki fær við sær úr Fuglafirði, so verður munurin undan trimum teimum síðstu umførunum níggju stig. Málmunurin hjá Skála er væl verri, enn hann er hjá KÍ.

- Vit spæla fyri møguleikanum, og vit hava framvegis gott mót um, at tað skal bera til, sigur Skála liðformaðurin Pauli G. Hansen. Skála hevur áður verið í svárari kreppu og kortini riðið stormin av. Tvey tey fyrstu árini í bestu deildini – í 2002 og 2003 – stóð heilt illa til, men Skála kom undan niðurflytingini.

Bogi Gregersen hevur verið sera væl upplagdur, síðani hann fyrr í summar aftur gjørdist partur av Skála álopinum. Nú er Bogi burturstaddur í arbeiðsørindum, og hann verður ikki við í Fuglafirði. Oby hevur ikki verið nógv ímillum teir fyrstu ellivu seinastu tíðina. Nú er møguleiki fyri, at hann verður í álopinum saman við Jónhardi Frederiksberg.

Skála hevur fyrr í ár tapt 1-0 í Fuglafirði og vunnið 3-2 á heimavølli ímóti ÍF.

ÍF hevur 26 stig, men fuglfirðingar kenna seg ikki heilt tryggar.

- Tað er neyðugt við nøkrum stigum afturat, um vit skulu vera vísir í at sleppa undan niðurflytingini. Avbjóðingin hesa ferð verður torfør, men um tað eydnast at vinna, so fer at síggja heilt hampuligt út, staðfestir ÍF venjarin Albert Ellefsen.

Miðverjin Jonn Thomsen er tøkur aftur eftir leikbann, og vinstri vongverjin Jan Ellingsgaard er tøkur aftur, eftir at hann var burturstaddur síðsta sunnudag, tá ið ÍF tapti í Gundadali ímóti HB.

B68-KÍ:

# Pílurin vísir hvønn sín veg

**Meðan B68 hevur riðið á aldukambinum síðani tepra sigurin í Klaksvík, hevur tað hilnast so mikið illa hjá klaksvíkingum, at teir framvegis eru í vanda fyri at flyta niður**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikukvøldið 6. august vitjaðu Bill Jacobsen og B68 í Klaksvík. Toftamenn og klaksvíkingar vóru lið um lið á støðutalvuni í summarsteðginum, og talan var um tætta uppgerð, sum leingi tóktist skula enda málleys. Í síðstu løtu skoraði unglingaspælarin Jóan Símun Edmundsson fyri B68, og harvið struku toftamenn avstað við øllum stigunum.

Talvan vísir, at tað síðani tá hevur hilnast væl hjá B68. Toftamenn hava síðani summarsteðgin vunnið 18 stig, meðan tað hevur hilnast minni væl hjá KÍ, sum burturúr átta umførum ikki hevur vunnið meiri enn 7 stig. Tí líta toftamenn nú fram ímóti ovaru hálvu, meðan klaksvíkingar framvegis spæla fyri lívinum í bestu deildini.

Hjá B68 er veteranurin Arnbjørn Danielsen framvegis skaddur. Orsaka av skaða í fótinum var hann ikki við í 2-1 sigrinum á Skála. Arnbjørn royndi at venja í gjárkvøldið, men tað tóktist ikki sum um, at hann verður tøkur seinnapartin í morgin. Dánial



Pauli Højgaard var avloysari á høgra vongverja, og hann verður ivaleyst biðin aftur.

Á Skála sá vongspælarin í høgru, Kristian Anton Andreasen, gult fyri fimtu ferð. Tí er hann leikbannaður í morgin. Allir hinir B68 spælararnir eru tøkir. Teir eru fullir í sjálvsáliti, og tað er einki at ivast í, at Bill Jacobsen fer at duga væl at seta teir upp ímóti sínum gomlu bygdarmonnum.

Í Klaksvík hjálpti tað ikki sørt upp á fótbóltslagið, at tað síðsta sunnudagt á heimavølli eydnaðist at vinna á B71. KÍ er tó framvegis í vanda fyri at flyta niður, og tað kann roknast við, at ein partur av eldhugaðu áskoðarafjøldini, sum sunnudagin royndi at bera og stuðla, verður á Svangaskarði í morgin. Eisini tí at tað er tunnilsdagur.

Jan Andreasen var ivasamur undan B71 dystinum. Hann spældi við, og hann skoraði sigursmálið. Jan er framvegis ivasamur, men tað verður roknað við, at hann aftur hesa ferð verður ímillum teir fyrstu ellivu. Rógvi Jacobsen og Rodrigo eru framvegis ivasamir, og teir vera í hvussu so er ikki við frá fyrsta bríksli. Tað verður miðverjin Milic Curcic, sum var leikbannaður síðsta sunnudag.

Tá ið KÍ fyrr í ár vitjaði á Svangaskarði, var úrslitið 1-1.

## VB/Sumba kann avgera

**Hóast kapprenningin í oddinum er hørð, so kann VB/Sumba um vikuskiftið skapað sær best hugsandi fortreytirnar fyri uppflyting til Formula-deildina**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VB/Sumba, sum leygardagin spælir á Sevmýri, er í løtuni fýra stig framman fyri AB. Skal støði takast í dystunum, sum higar til eru spælir í ár, so hevur VB/Sumba á tí so væl kenda pappírinum bert tveir truplar dystir eftir. Nevnliga tann leygardagin og so heimadystin móti 07 Vestur. Teir báðar seinastu dystirnar spælir VB/Sumba á útivølli móti Víkingi og heima móti EB/Streymi, og alt annað líka eiga hetta at vera dystir, har oddaliðið fær fulla úrtøku. Ein sigur leygardagin ber tí við sær, at VB/Sumba næstan hevur ráð at tapa heimadystin móti 07 Vestri, tó at eingin sum helst ivi man vera um, at teir eisini í hesum dystinum vilja prógva, hvussu sterkur heimavøllurin vesturi á Eiðinum er.

Samstundis trýst 07 Vestur og AB tó á fyri at halda lív í sínum Formula-vónum. 07 Vestur spælir heima móti Víkingi, og AB spælir somuleiðis heima ímóti NSÍ. Í botninum skal EB/Streymur hava trý stig frá KÍ, um teir skulu hava møguleika at bjarga sær, og á Svangaskarði skal B68 helst hava nakað burtur úr sínum dysti móti HB.